TIT SPYRJA VIT SVARA

Bergur Hanusson, djóralækni

Heri Joensen, prestur

Heri Kragesteen, sálarfrøðingur

Ingi Højgaard, løgfrøðingur

Jens Andreassen, lækni

Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur

Jón Klein Olsen, politistur


Jón Kragesteen. Ferðslutrygd

Julianna Næs, pedagogur

Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi

Turid Thomsen, lestrarvegleiðari

Marius Staksberg, málfrøðingur

LØGFRØÐINGURIN

Kann eg krevja ognartikna jørð aftur

Eg havi keypt eini eldri sethús við tilhoyrandi garði kring húsini. Fyri uml. 20-30 árum síðani ognartók kommunan ein part av garðinum frá tí fyrrverandi eigaranum. Ætlanin var at breiðka um vegin, ið liggur fram við húsunum. Hetta var tó ongantíð gjørt, og eg veit við vissu, at ætlanin er slept. Eg spyrji tí, um tað er rætt at kommunan framhaldandi skal eiga part av garðinum. Kann eg krevja at fáa tann yvirtikna partin av garðinum aftur?

Tá kommunan ognartekur, er tað vanliga til eitt ávíst endamál. Endurgjald skal latast til viðkomandi, sum ognartikið verður frá. Um so er, at endamálið sum ognartikið varð til verður slept, vil eg meta, at tann sum ognartikið er frá, hevur krav uppá at fáa tað ognartikna aftur. Hetta má hann lata gjalding afturfyri. Um so er, at endamálið at breiðka vegin í hesum føri, er endaliga slept, vil eg meta, at fyrrverandi eigarin og ikki tygum, hevur krav uppá at fáa tað ognartikna aftur, ímóti at rinda kommununi eitt ávíst gjald.

DJÓRALÆKNIN

Kunnu tjøldur og vindur bera smittu hendavegin

Nú munn- og kleyvsótt er farin at herja í Stóra Bretlandi og kanska aðra staðni í Europa við, hava flestu lond sett sera strong trygdarkrøv í verk. Norski landsdjóralæknin hevur mælt norðmonnum frá at ferðast í Onglandi, og tað, sum kemur úr Onglandi í ymisk lond, verður sóttreinsað. Eisini klæðir og fólk, sum hava verið í Onglandi og ferðast, skulu ikki í nánd av dýrum í fimm dagar o.s.fr. Hetta er tíðin, tá ið tjøldrini og annar flytifuglur við, koma til Føroya. Er vandi fyri, at tey draga smittuna við sær til Føroya? Er vandi fyri, at smittan kemur higar við vindinum?

Orsøkin til munn- og kleyvasótt er eitt sonevnt aphthovirus av picornavirus slagnum. Sjúkan er ein tann mest smittandi sjúkan hjá húsdýrum, men hin vegin er smittuevnið ikki serliga mótstøðuført, samanborið við onnur smittuevni. Tað heldur sær best í kulda, og fer hitin upp um 50 stig, verður tað óskaðiligt. Heldur ikki tolir tað sýru ella lút.

Tað eru fyrst og fremst kleyvdýr, sum verða smittað. Hjá okkum neyt og seyður. Munn- og kleyvasótt kann smitta beinleiðis frá dýri til dýr, óbeinleiðis til dømis við fólki, dýrum ella við bilum, ella hon kann berast við vindinum. Tað verður roknað við, at virus kann halda sær í upp til 30 dagar í umhvørvinum, og at tað kann flytast við vindi í mesta lagi 60 km yvir landi og 300 km yvir havinum, alt eftir umstøðunum, til dømis avfalli og hitanum í luftini. Ein ávís nøgd av virus er tó neyðug, fyri at dýrið skal verða smittað. Á einum fugli ella við luft, flutt langa leið av vindi, er møguleikin fyri stórari konsentratión av smittuevninum ikki stórur. Vandin fyri, at smittan kann berast av flytifugli ella við vindinum úr Onglandi til Føroya, má tí metast at vera sera lítil, hóast møguleikin ikki kann útihýsast heilt.

FØÐSLU- OG HÚSARHALDSFRØÐINGURIN

Gularótabollar

Kann føðslu- og húsarhaldsfrøðingurin hjálpa mær við einum spurningi. Eg baki ofta bollar, børnini elska teir, men eg kundi hugsað mær at baka sunnari bollar enn teir, eg havi bakað í nógv ár. Hevur tú eina uppskrifti uppá sunnar bollar, sum kortini smakka væl?

Tað finnast nógvar góðar uppskriftir. Eg havi funnið eina uppskrift uppá gularótabollar, sum mínum børnum dámar væl. Bollarnir torna ikki so skjótt, av tí at gularøtur eru í. Væl gagnist.

Gularótabollar (30 stk)

Tilfar:

2	dl	rugkjarnir
2	dl	kókandi vatn
50	g	ger
2	dl	hvíta
3	dl	vatn
1/2	dl	olja
2	tsk	salt
1	súpisk	sukur
2	dl	sigtimjøl
4		rivnar gularøtur
800	g	hveitimjøl

Arbeiðsháttur:

1. Koyr 2 dl av kókandi vatni útyvir rugkjarnirnar og set kjarnirnar at kølna
2. Upploys gerina í 3 dl flógvt vatn og rør restina av tilfarinum í, tó ikki alt hveitimjølið í senn, tað verður elt í so við og við.
3. Elt deiggið væl saman
4. Set deiggið at ganga á flógvum stað í uml 1 tíma
5. Koyr deiggið í 2 og rulla tvær longdir, sker hvørja í 15 stk sum síðani verður formað til bollar
6. Set bollarnar á eina plátu við bakipappíri á og lat bollarnir ganga í uml. 30 min
7. Pensla bollarnar við egg. Set bollarnir í heitan ovn 200 C og baka í uml. 15-20 min.

Kj: 619 í einum bolla
P: 10%
F: 14%
K: 76%

PRESTUR

Hvør leiðir í freistingar?

Tá ið vit biðja faðirvár, siga vit: leið okkum ikki í freistingar. Hví? Tað er jú illimaður, sum leiðir okkum í freistingar, ikki Gud?

Faðirvár er bøn, ið frelsarin lærdi lærusveinar sínar, og hon er givin teimum sum dømi uppá eina rætta bøn. Í faðirvár er inngangur og seks ella sjey bønir, alt eftir hvussu vit skifta faðirvárinum og so er ein endi, ið samtíðis er ein lovprísan av Guði.

Spurt var um sættu bøn: "Leið okkum ikki í freistingar"? Soleiðis sum lærusveinar Kristusar biðja. Tær royndir, ið teir óttast koma frá Guði og hava tí eitt positivt mál fyri eyga, og her biðja teir um hjálp fyri at vinna sigurin góða.

Frá Gamla Testamenti vita vit, at Guð royndi menniskju (1. Mósebók 22, vers 1). Men Guð vil ikki loyva, at tit verða freistað út um tað, tit orka tvs. Hann vil ikki lata okkum freistast til fals. (1. Korintbr. 10, vers 13). Tá menniskju so falla í freistingini verða tey drigin og lokkað av sínum egnu girnd og óndu lystum (Jákupsbr. 1, vers 14)

Tí biðja lærusveinarnir um at verða spardir fyri slíkar freistingar, ið teir av egnum ávum ikki klára. Teir biðja um Guðs vegleiðing og varðveistlu, hjálp í royndum.

Tí skulu vit í dag við teirra fyrimynd vaka og biðja og fylgja væl við.

Lesið annars m.a. Jákupsbræv kap. 1, vers 12-18, har sagt er, at freistingarnar eru ikki frá Guð sum bert gevur góðar gávur. Vit skulu biðja um hansara varðveistlu í staðin fyri at lítа á egnan mátt og megi. Tað er álit á Guð. Ált er trúgv.

Spyrjið serfrøðingarnar

Hava tit spurningar til serfrøðingarnar, kunnu tit senda teir til:

Sosialin
postsmogu 76
110 Tórshavn

ella á fax: 314720
og teldupostadressuna:
spyr@sosialurin.fo

Stór trølla-konsert í Øravík

TÍÐINDASKRIV

Suðuroyingar verða teir fyrstu sum sleppa at síggja trølla-ungan.

Suðuroyingar verða teir fyrstu, sum fáa at vita, hvussu nógv høvd trøllababyin kemur at hava, tí sunnudagin 18. mars, fer Trølla Pætur saman við øðrum, at hava eina konsert í Gistingarhúsinum í Øravík.

Trølla babyin kom til verðuna 10. mars, men eingin veit enn, hvussu nógv høvd hesin ungi hevur. Á heimasíðuni hjá Trølla Pætur hevur kapping verið um, hvussu nógv høvd ungin kemur at hava og hava uml. 800 børn stemma. Á konsertuni í Øravík verður so drigið í millum øll tey sum hava gita rætt. Vinnarin fær eitt gávukort á 1.000,- frá BR.

Umframt at trølla-ungin verður at síggja fyri fyrstuferð, so verður nógv annað spennandi á konsertuni. Omma Trølla Pætur hevur nýliga verið í studio, har hon hevur spælt nakara heilt nýggjar sangir inn. Omman sigur í stuttari viðmerking, at av tí at hon sjálv er nakað vill eru allir sangirnir villir og lívligur.

Ein annar sum eisini verður á konsertuni er Brandur Enni. Brandur er eftir hondini blivin ein sera kendur persónur. Umframt at hava sungi nógv í Føroyum saman við Kulum Rótum o.ø., hevur Brandur tikið íslendingar á bóli við sínu kláru og góðu rødd. Í Íslandi verður Brandur spáddur eina gylta framtíð sum sangari.

Umframt sangarar og dansarar fáa øll vitjandi høvi at heilsa uppá Nósa, sum er ein sera góður vinur hjá Trølla Pætur.

Á konsertuni verða so Trølla Pætur og Omma hansara, Brandur Enni, Nósi og trølla-ungin. Konsertin verður sum sagt sunnadagin 18. mars og byrjar hon klokkan 16.00.

Forsølan av atgonguмerkinum eru at fáa á Statoil-støðunum á Tvøroyi og Vági. Fyrireikarnir siga at endans, at tað verður avmarka atgongd.

VIÐMERKINGAR

Ísrael – eitt mótsagnarinnar tekin

Stig Ahrensbach (Sent hevur Annika Magnussen)

Ongantíð hevur verið so neyðugt at skilt, hvat Ísrael í veruleikanum merkir. Tey flestu hava sína hugsan um »stríðið í Miðeystri«, men mong hava samstundis lit við at skilja, hví tað er so torført at fremja frið í hesum økinum. Trupulleikin er, at vit her hava við eitt mál at gera, sum ikki kann greinast út frá einum politiskum, sosialum ella fíggjarligum sjónarhorni – vit hava her at gera við ein andaligan stríðsspurning, ið bert kann greinast út frá teimum mótsetningum, sum finnast í tí andaliga heiminum.

Útveljan

Útgangsstøðið fyri at skilja stríðið um Ísrael, er at finna í tí guddómliga prinsippinum, ið gongur sum ein reyður tráður gjøgnum alla ta bíbilsku heimssøguna. Prinsippið er: Útveljan. Hetta prinsippið hevur Gud nýtt í allari frelsissøguni, og um vit ikki fáa eyga á tað, er púrasta ógjørligt at skilja týdning og sess Ísraels í søguni.

Lat okkum hyggja at sjey útveljarum, sum allar hava við Ísrael at gera:

1. Gud valdi Adam g Evu millum allar skapningar sínar at ráða yvir jørðini (í Guds navni og anda)

2. Gud valdi Nóa millum allar menn at bera mannaættina víðari og at bjarga øllum djórasløgum eftir syndaflóðina.

3. Gud valdi Ábramham millum øll fólk jarðarinnar at verða ættfaðir hjá jødiska fólkinum og til – gjøgnum børn síni – at bera signing til allar ættir heimsins.

4. Av synum Ábrahams valdi Ísak heldur enn Ísmael at taka ímóti teimum lyftum, Gud hevði givið Ábrahami.

5. Gud valdi Jákup heldur enn Esau at taka ímóti teimum lyftum, Gud hevði givið Ábrahami og Ísaki.

6. Gud valdi tólv synir Jákups at verða ættfedrar hjá teimum tólv ættarbólkunum í Ísrael og at taka ímóti teimum lyftum, Gud gav Ábrahami, Ísaki og Jákupi.

7. Gud (Jesus) valdi út tólv jødiskar lærusveinar og seinni øll tey, sum trúgva evangeliunum. Tey fáa lut í teimum lyftum, Gud gav Ábrahami, Ísaki og Jákup, tólv synum Jákups og gjøgnum teir øllum tí jødiska fólkinum.

Eftirkomarar Ábrahams

Tað, at Gud velur út Ábraham og ætt hansara hevur sjálvandi eitt djúpari endamál. Í Eden hevði Gud eftir syndafallið profeterað yvir Satani, at avkom kvinnunnar einaferð fór at knúsa høvur hansara. Tað er upplagt, at hin óndi, eftir hetta lá upp á lúr eftir hesum avkomi, so hann kundi beina fyri Guds ætlan. Tá so Gud kallaði Ábraham, var Satani greitt, at umrødda avkom fór at koma frá ætt Ábrahams. Paulus ger jú vart við, at lyfti Guds varð givið Ábrahami og avkomi hansara – og hann greiðir frá, at orðið avkom stendur í eintali, og at sipar til Kristus (Gal. 3:16).

Tað, sum vit her hava við at gera, er einki minni enn frágreiðingin um, hví jødar í so mong áratúsund hava verið forfylgdir. Mong hava royndt at granska og greina jødahatrið, men veruliga frágreiðingin er at finna í tí markleysu øði hjá Satani ímóti teirri ætt, sum Gud valdi sær til, at heimsins frelsari skuldi renna av.

Opinberingin

Hvussu hevur tað borið til, at jødiska fólkið hevur yvirlivað allar hesar forfylgingar í øll hesi mongu ár – og hevur megnað at varðveitt sín samleika sum fólk. Paulus svarar hesum spurningi í Rómverjabrævinum, har hann skrivar, at Gud ikki angrar sínar náðigávur og sítt kall (Róm. 11:29). Hóast Harrin stundum hevur revsað fólk sítt, tí tey viltust burtur frá trúnni, so hevur hann kortini ongantíð slept teimum. Tey lyfti, hann gav Ábrahami, Ísaki og Jákup standa við, og tað hava tey gjørt gjøgnum allar tíðir. Tí fer Gud eisini ein dag at opinbera son sín sum hin upprisna fyri jødiska fólkinum – hetta fer at gera at øll tjóðin fer at venda um (les Zak. 12:9-14).

Opinberingin av Jesusi fer at koma í tí løtu, tá øll vón tykist úti fyri Ísrael. Hatrið ímóti Ísrael fer at koma í hæddina beint undan tí tíðini, tá Jesus kemur aftur. Land eftir land fer at venda sær ímóti Ísrael. Og at enda fara tjóðir frá øllum teimum fýra heimshornunum at savnast og kringseta Jerúsalem, tí tær ætla at taka »býin hjá Konganna Kongi«. Tá fer tað at henda, at himmalin opnast og Jesus kemur við sínum himmalsku herskarum, at festa føtur sínar á Oljufjallið. Hann fer at beina fyri øllum figgindum Ísraels. Og eftir hesa orrustu fer Harrin sjálvur at »hertaka« Jerusalem og haðani at breiða sítt friðarríki um allan heim.

Mótsigan

Vit hava tosað um guddómliga prinsippið »útveljan«. Eitt andsagnarligt prinsipp, sum upprunaliga var satanskt, er mótsigan. Tað, sum eg við hesum meini er, at tá Gud velur út, svarar hin óndi aftur við mótsigan. Rættari sagt: Tað, sum Gud elskar, hatar Satan – og øvugt. Kærleiki Guds til fólk sítt – herí er íroknað samkoman í nýggja Testamenti – er endaleys. Sama er at siga um hatur Satans til tey útvaldu. Hann roynir tí av øllum alvi at villa tey útvaldu burt av leið – burt frá vilja og ætlan Guds. Tíverri mugu vit ásanna at tað ofta eydnast honum. Til dømis byggir tann sokallaða friðartilgongdin á púra skeivar fortreytir. Friður verður ikki, um bert Ísrael letur ein part av landinum til palestinar, og als ikki so leingi hesir eru undir islamiskari ávirkan. Fyri muslimsku trúnna er staturin Ísrael undir jødiskum valdi nakað av tí ræðuligasta, sum til er, og tí verða muslimar ongantíð nøgdir við ein part av landinum – teir stremba eftir at fáa alt.

Nakað, ið ger hetta mál enn meira álvarsamt er, at Ísrael í síðsta enda er Guds land – og hann hevur sambært skriftunum valt at geva jødiska fólkinum tað. Tí ganga tær tjóðir, ið nú leggja trýst á ísraelsku stjórnina at fáa hana at góðkenna ein palestinskan stat í lovaða landinum, beinleiðis ímóti Harranum sjálvum. Og tað fer um skamma stund at gera, at lemjandi dómur verður feldur yvir hesar tjóðir.

Hetta, sum eg her havi sagt, eigur ikki at týðast soleiðis: »Ísrael bert fyri jødar«. Avgjørt ikki. Sjálvandi skal verða pláss fyri »teimum fremmandu«. Men tað er av avgerandi týdningi, at jødiska fólkið varðveitir yvirvaldsrættin yvir øllum landinum; tað hevur Gud nevniliga gjørt av.

Borgarskapur

Hvat skulu vit sum kristin halda um, at tjóð eftir tjóð vendir sær ímóti Ísrael – vit búgva jú sjálvi í hesum londum? Jú, rætt er tað, men vit eru samstundis borgarar í einum ósjónligum ríki: Guds ríki. Og borgaraskapur okkara í Guds ríki er týdningarmeiri enn nakar annar borgarskapur. Tí hevur tað meira at siga, hvat Gud heldur um Ísrael enn hvat ein donsk, týsk ella amerikonsk stjórn heldur. Um vit, sum borgarar í Guds ríki, seta til viks æviga trúskap okkara ímóti Ísrael eru vit av álvara vilst av leið.

Bengt Göransson fyrilestri um demokrati

TÍÐINDASKRIV
frá Norðurlandahúsinum

Hóskvøldið 15. mars 2001 kl. 19.30 fer fyrrverandi svenski mentamálaráðharrin Bengt Göransson at hava fyrilestur um demokrati.

Hann nevnir sjálvur fyrilesturin soleiðis:

"Bonaðu gólv valdsins og kjallaraskot máttloysisins – hugarensl um korini hjá fólkavaldinum".

Bengt Göransson er, sum fyrr sagt, fyrrverandi svenskur mentamálaráðharri, og var tað hann, sum kom til Føroya við Seyðabrævinum í 1990.

Árini 1992-2000 hevur Bengt Göransson sitið sum stýrislimur fyri Norðurlandahúsið í Føroyum, valdur av svensku stjórnini, og tey fyrstu árini av skeiðnum sat hann sum formaður í Stýrinum fyri Norðurlandahúsið Føroyum.

Bengt Göransson hevur síðani 1. juni 2000 sitið sum stýrisformaður í Foreningen Norden í Svøríki.

Fyrilesturin í Norðurlandahúsinum er almennur.

Fyrilestur: Fiskevandringer og meningen med livet

Almennur fyrilestur á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya fríggjadagin 16. mars 2001 kl. 14

TÍÐINDASKRIV
Fróðskaparsetrið og Fróðskaparfelagið

Jarl Giske, professari á Institutt fyri fiskivinnu- og marinbiologi á universitetinum í Bergen, heldur fyrilestur, ið hann kallar: Fiskevandringer og meningen med livet.

Jarl Giske vitjar Náttúruvísindadeildina sum gestalærari. Hendan fyrilesturin fer hann at skipa bæði sum studentafyrilestur og almennan fyrilestur.

Um fyrilesturin sigur Jarl Giske: Forelesningen tar sikte på å vise hvordan evolusjonsteori kan utnyttes til å forstå og modellere atferden til fisk og andre marine organismer. Forelesningen starter med å forklare grunntrekkene i evolusjonen, hvordan evolusjonen former genene slik at organismene lever på en slik måte at de maksimerer sin reproduksjonsrate. Selv om fisker og plankton er stort sett uvitende om sin egen eksistens, kan vi si at evolusjonen har formet deres gener slik at individene tilsynelatende lever målrettet. Dette kan også utnyttes i modellering av atferd og livssykluser. Fisker utnytter imidlertid også andre fiskers erfaringer, de lærer af hverandre. Sosial læring er en vigtig utviklingsmekanisme som til dels skjer uavhengig av genetisk evolusjon. Til sist trekkes mennesket inn i forelesningen, og det vises at vår atferd også kan forståes som evolusjonære tilpasninger. Men i vår art er den kulterelle evolusjonen mye raskere enn den biologiske. Dette har forandret meningen med livet for menneskene.

Sí eisini heimasíðuna www.setur.fo/almen.html

Nýtt hugfar

Saman við politisku ungmannafeløgunum skipar FUR fyri almennari ungdómsráðstevnu, sum verður á Føroya Fólkaháskúla 31. mars

TÍÐINDASKRIV
Føroya Ungdómsráð

Endamálið við ráðstevnuni er, at skapa áhuga millum ung fyri samfelagsviðurskiftum, at koma saman til fyrlestrar og at skifta orð um okkara samfelag og um politiskar hugsjónir.

Fyrireikari av ráðstevnuni er Føroya Ungdómsráð, Ungmannafelagið Samband, Ung Fyri Miðflokkin, Sosiakistiskt Ungmannafelag, Unga Sjálvstýrið, Unga Tjóðveldið og Fólkafloksungdómur.

Ráðstevnan er fyri ung, men er almenn og opin fyri øllum áhugaðum. Neyðugt er ikki at vera limur í nøkrum politiskum ungmannafelag fyri at luttaka.

Neyðugt er ikki við tilmelding framanundan og ókeypis er at luttaka.

Nýtt hugfar verður á Føroya Fólkaháskúla og byrjar leygarmorgunin 31. mars kl. 09.30. Um morgunin fara politisku ungmannafeløgini at greiða frá hvørji tey eru og hvat tey vilja við sínum virksemi. Seinnapartin verður kjakforum, sum tveir journalistar fara at stila fyri. Um kvøldið verður cafékvøld við upplestri og tónleiki.

Nágreiniligir upplýsingar og skrá er á heimasíðuni hjá Føroya Ungdómsráð: www.fur.fo.

FUR og politisku ungmannafeløgini vóna og vænta at nógv ung fara at sýna hesum tiltakinum áhuga og møta fjølment til Nýtt hugfar.